## Tríggir brøður á sama liði

Tá AB vann sín fyrsta sigur á heimavølli ímóti Víkingi í næstbestu deildini, var tað við trimum brøðrum á liðnum. Heðin Stenberg, Jónas Stenberg og Fróði Stenberg vóru allir við á liðnum hjá AB. Yngsti bróðurin, Heðin vardi málið hjá AB, meðan miðlingurin, Jónas og elsti bróðurin, Fróði báðir skoraðu mál í hinum endanum fyri AB. GÍ hevði á sinni tríggjar brøður á liðnum, tá Pauli, Magni og Henning Jarnskor tørnaðu út fyri besta liðið hjá GÍ, og vóru við til at vinna bæði FM og steypakappingina. Góða TB-liðið í 1970-unum hevði eisini tríggjar brøður á liðnum. Sigmund Nolsøe, og so tvíburðarnar, Ásmund og Trónd. Nolsøe-brøðurnir vunnu eisini bæði FM og steypakappingina við TB. Heðin, Jónas og Fróði eru synir hjá Tòrálv Stenberg, sála, sum í mong ár var formaður í AB.

# Raskur Holst tapti aftur

Rólant Waag Dam



Enn einaferð taptu Christian Lamhauge Holst og Silkeborg. Hesaferð var mótstøðuliðið OB, sum vann javna dystin við einum máli. Silkeborg er av sonnum í einum aldudali fyri tíðina. Við dystinum leygardagin hevur liðið ikki vunnið í sjey dystir, og nú liggja uppflytararnir ikki longur á óvæntaða triðja plássinum, men eru nummar sjey í deildini. Holst spældi til tað restaðu fimm minuttir. Landsliðsleikarin var rættiliga sjónligur í fyrra hálvleiki, men hvørki hann ella liðfelagarnir megnaðu at skora. Tað nærmasta Holst kom einum máli, var eitt skot úti frá eftir 20 minuttir. Nú harmast hann og liðfelagarnir um tapi, tí Silkeborg hevði kjansir til fleiri mál og eisini fleiri stig.

*rolant@sosialurin.fo*

# Loksins tapti Atli og Roskilde

Rólant Waag Dam

Føroyski landsliðsleikarin við 17-talinum á bakinum í FC Roskilde, spældi allan dystin á tamb, tá hann saman við restina av liðnum vitjaði hjá FC Fyn. FC Roskilde hevur veruliga verið væl koyrandi seinastu dystirnar og hevur ikki tapt ein dyst, síðani kappingin varð tikin upp aftur eftir vetrarsteðgin. Henda góða gongd varð tó steðga í dag, tá FC Fyn vann ógvuliga tepurt 1-0. Í FC Roskilde iðra teir seg um hetta, tí teir høvdu fleiri finar kjansir í fyrra hálvleiki, samstundis sum málið hjá FC Fyn fall eftir eitt ógvuliga bíligt brotsspark í seinna hálvleiki. Atli Danielsen hevði ikki nakran málmøguleika, men var maðurin aftanfyri fleiri vandamiklar deyðbóltsstøður. Júst hetta vápnið eru tey sera fegin um í Roskilde, og hava tey eisini notið gott av tí í øðrum dystum.

*rolant@sosialurin.fo*



***Atli Danielsen og FC Roskilde, hava verið væl koyrandi, men móti FC Fyn, taptu teir við einum máli móti ongum.***

*Mynd: Savnsmynd*

# Spjótkast í góðari menning

**SPJÓTKAST Tilgongdin millum yngra ættarliðið er rættiliga eyðsýnd í spjótkasti. Og leygardagin royndu sjey ungir spjótkastarar seg á Tórsvølli.**

Heri Simonsen

Frælsi ítrótturin byrjar at heysta fruktirnar av teimum bøttu umstøðunum innan frælsan ítrótt. Kastilegendan, Heri Ziska hevur gjørt eitt stórt miðvíst og slóðbrótandi arbeiðið fyri at fáa veruliga gongd á ta aldargomlu, olympisku ítróttina. Leygardagin vóru tað sjey luttakararar í spjótkasti, allir úr Hvirluni, og hóast kalda undanvindin, sum gav nógvum kastarum trupulleikar, so komu nógv met til hóldar. Helgi Geyti gjørdi, sum hann er vanur og betraði bólkametið, hesaferð við næstan 2 metrum, so tað nú er 41,69 metrar. Kasti kom í triðja umfarið, og var tað ikki serliga væleydna tekniskt, men hesaferð megnaði Helgi ikki at finna eitt betur tekniskt kast fram, og endaði hann tí á 41,69 metrum, sum var 31 cm. ov stutt til at klára a-kravið til talentbólkin hjá FÍF, men b-kravið (40,50 m) bleiv klárað. Hanus Bergsson, sum er við at knekka ta teknisku koduna viðv. spjótkasti, betraði sítt persónliga met við meir enn 5 metrum og klára̱ði eisini b-kravið til talentbólkin. Har er tó nógv eftir at heinta fram. Tróndur Arge og Bjørk Svabo betraðu eisini síni persónligu met, so tey nú er ávikavist 29.02 metrar og 16,03 metrar.

*heris@sosialurin.fo*

## Úrslitini í spjótkasti vóru:

| Bólkur | Reiðskapur | Íðkari | Árg. | Felag | Úrslit |
|---|---|---|---|---|---|
| Menn | 800 g | Rógvi Højgaard | 1983 | Hvirlan | 49,60 m |
| D16-17 | 700 g | Helgi Geyti | 1993 | Hvirlan | 41,69 m bólkamet |
| | | Tróndur Arge | 1994 | Hvirlan | 29,02 m pers. met |
| | | Steinolvur Geyti | 1994 | Hvirlan | 28,09 m |
| D14-15 | 600 g | Hanus Bergsson | 1995 | Hvirlan | 36,79 m pers. met |
| | | Hallur Simonsen | 1995 | Hvirlan | 23,73 m |
| G14-15 | 600 g | Bjørk R. Svabo | 1996 | Hvirlan | 16,03 m pers. met |